## Bretskur Fritzl

Í meiri enn 25 ár hevur ein maður í Bretlandi gjørt seg inn á tær báðar genturnar, sum hann eigur. Hann hevur neyðtikið tær fleiri ferðir. Blaðið The Times skrivar, at genturnar hava verið við barn 18 ferðir. Níggju ferðir kastaðu tær burtur, tvey børn vóru deyðfødd, og tvey av teimum sjey børnunum, sum eru á lívi, hava likamlig brek. Tann 56 ára gamli maðurin hevur fingið lívlanga fongsulsrevsing. Í gjár bóðu teir bretsku myndugleikarnir um umbering fyri, at teir sviku familjuna. Tað er komið fram, at 25 ymsir myndugleikar høvdu samband við familjuna, uttan at nakað bleiv gjørt.




## Hvørt sín veg

Mangar eru søgurnar um fólk, sum ferðast við flogfari úti í heimi, og sum standa við ongum viðføri, tá tey halda seg vera komin vegin fram, tí at viðførið er farið onkran annan veg. Hetta hendi millum annað í gjár, tá tvey flogfør hjá íslendska flogfelagnum Icelandair fóru úr Íslandi til ávikavist Keypmannahavnar og Oslo. Ferðafólkini komu hagar, tey høvdu ætlað sær, men tað vísti seg, at viðførið hjá teimum, sum vóru farin til Oslo, var endað í Keypmannahavn og øvugt, skrivar Morgunblaðið.

# Ætlanin at leggja skúlar saman er bumbað í knús

**Lærarafelagið hevur ein sterkan illgruna um, at samgongan hevur eina fjalda dagsskrá við ætlanini at umleggja føroyska fólkaskúlan og tí er ætlanin við at syndrast**

FÓLKASKÚLIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Fáa vit ikki neyðugu trygdina frá politisku skipanini, fara vit at arbeiða við hond og fót ímóti ætlaða skúlareformninu, sigur Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag*

- Stórfingna ætlanin hjá Helenu Dam á Neystabø um at umskipa allan tann føroyska fólkaskúlan, er við at verða bumbað í knús. So avgjørdur er Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag.

Tað var annars við opnum sinni, at Lærarafelagið tók undir við Helenu Dam á Neystabø, tá ið hon kunngjørdi ætlanina um ein umfatandi skúlareform, har skúlar skuldu samanleggjast og samskipast og skúlarnir skuldu fække munandi í tali.

### Endamálið var at spara pening!

Men landsstýriskvinnan legði dent á, at spardi peningurin skal verða verandi í skúlaskipanini. Men við umleggingunum fer at bera til at fáa ein nógv betri fólkaskúla við tað, at játtanin verður gagnnýtt betri til eina betri undirvísing.

Landsstýriskvinnan var sannførd um, at hetta er einasti máti at lyfta fólkaskúlan upp á eitt hægri støði, tí tað er ikki væntandi, at játtanin fara at hækka nakað serligt tey næstu árini.

### Fjald dagsskrá

- Hetta var ein ætlan, sum Føroya Lærarafelag tók fult undir við og sum felagið var sinnað at samstarva við landsstýriskvinnuna um, sigur Magnus Tausen.

Men nú hevur Lærarafelagið ein sterkan illgruna arbeiðir við eini fjaldari dagsskrá.

- Vit hava ein illgruna um, at veruliga endamálið við at umskipa skúlan, er at spara pening, sum síðani skulu brúkast til at typpa hol aðrastaðni í fíggjarlógini við, sigur Magnus Tausen.

Hann sigur, at tað eru ymsar fráboðanirnar úr politiska umhvørvinum seinastu tíðina, sum hava kynt uppundir illgrunan um, at veruliga endamálið við at leggja skúlar saman, er ikki at frígeva pengar, sum síðani skulu verða verandi í skúlaskipanini fyri at lyfta skúlan upp á eitt hægri støði.

- Vit hava ein sterkan illgruna um, at endamálið er eina og aleina at finna sparingar, sum so skulu brúkast til at fíggja ymisk hall aðrastaðni á fíggjarlógini við.

- Sostatt fara sparingarnar ikki at koma fólkskúlanum til góðar og so er endamálið við umskipingini eisini fokið.

Magnus Tausen leggur dent á, at hann ivast ikki í, at sjálv hevur landsstýriskvinnan í mentamálum spælt við púra opnum kortum og at hennara veruliga ætlan er, at styrkja skúlan.

- Tað hevur alla tíðina verið grundarlagið undir samskiftinum millum lærarafelagið og mentamálaráðið um skúlareformin.

Tað eru meiri fráboðanir frá øðrum kreftum í samgonguni, sum ørkymlað hann.

Í sambandi við fíggjarlógina hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum beinleiðis nevnt í fjølmiðlunum, at fólkaskúlin skal umleggjast fyri at útvega eina sparing fyri at minka hallið á fíggjarlógin. Samstundis hevur fólkaflokkurin gjørt seg til talsmann fyri lønarsteðgi og fyri at skerja almennu útreiðslurnar.

Samstundis verður alsamt tosa um, at almenni geirin skal minka.

### Dottið sundur

Magnus Tausen sigur, at so er alt endamálið við skúlareforminum dottið sundur.

- Tað verður greiðari og greiðari fyri okkum, at veruliga endamálið við umleggingini er at finna ein posa við pengum, sum skal takast burtur úr skúlaverkinum og avleverast til landsstýrismannin í fíggjarmálum, so at hann kann brúka peningin til at minka hallið á øðrum økjum á fíggjarlógini við.

Magnus Tausen staðfestir, at hetta hevur gjørt, at hugurin hjá Lærarafelagnum at vera við í skúlareformonum, er við at fella heilt burtur.

- Tað er ótrúliga ørkymlandi, at politisku fráboðanirnar um sama mál eru so ymiskar.

### Rokning til børnini

Hann leggur dent á, at Lærarafelagið fer ikki at vera við í eini ætlanin, sum hevur til endamáls at drena skúlaskipanina fyri pengar.

- Vit vera ikki við í eini slíkari ætlan, uttan at vit fáa politiska trygd fyri, at pengarnir, sum verða spardir, verða verandi í skipanini.

Formaðurin í Lærarafelagnum sigur, at hann kundi væl ført fram, at skúlaverkið hevur brúk fyri væl størri játtan.

- Men sum støðan er nú, skilir hann, at rúm verða ikki fyri at hækka játtanina nakað serligt.

Men so mikið størri týdning hevur tað, at játtanin heldur ikki minkar, men verður gagnnýtt sum frægast.

- Næstan allar útreiðslurnar til skúlaverkið eru læraralønir og tað slepst ikki uttanum at hvør einasta króna, sum verður skarvað av játtanini til skúlaverkið, er ein króna, sum verður tikin frá undirvísingini. Og sostatt er tað ein rokning til eitt barn, sum ikki hevur nóg nógv frammanundan.

### Berjast við hond og fót

Magnus Tausen vísir á, at hesi næstu nógvu árini, hækkar útreiðslan til skúlaverkið einar 2,5 milliónir um árið, bara til eftirløn til sáttmálasettu lærararnar, sum verða settir í starv fyri tænastumannasettar lærarar og til broytingar í sambandi við starvsaldur.

- So bara tað, at játtanin stendur í stað, førur við sær, at játtanin til undirvísingina minkar næstan 2,5 milliónir um árið.

- Bara fyri at halda støðið, skal játtanin til skúlaverkið sostatt hækka næstan 2,5 milliónir um árið. Og tá er enntá ikki rokna við einari krónu í lønarhækking til lærarar.

Hann leggur dent á, at kravið frá Lærarafelagið verður sostatt, at trygd skal fáast fyri, at játtanin til skúlaverkið í minsta lagi verður varðveitt.

- Tað er øgiliga grundleggjandi fyri okkum og fáa vit ikki hesa trygdina, fara at vit at arbeiða við hond og fót ímóti skúlareforminum og ímóti hvørjari krónu, ætlanin er at skarva av játtanini.

- Men fáa vit tað trygdina, skulu vit ganga í fremstu røð at seta reformin í verk, leggur hann afturat.

## Jóannes Eidesgard er rørandi samdur

**Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum sigur, at eftir hansara tykki skal játtanin til fólkaskúlan ikki lækka, men geva nakað lyfti vegna samgonguna, kann hann ikki**

FÓLKASKÚLIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Játtanin til skúlaverkið skal ikki lækka.

Tað staðfestir Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Hann tekur fult undir við, at endamálið við ætlaða skúlareforminum skal vera, at upphæddin, sum verður spard, skal ikki takast úr skúlaskipanini, men skal brúkast til at styrkja skúlan við.

Hóast landsstýrismaðurin ikki heldur, at tað er ráðiligt at lække játtanina, tosar hann um, umleggingin kann gera, at játtanin kann frystast føst í nøkur ár.

- Og tað í sær sjálvum er ein stór sparing og hetta er tann sparingin, eg havi sipað til, sigur hann í stuttari viðmerking.

- Eg eri púra samdur í, at endamálið við skúlareforminum skal ikki vera at typpa hol onkra aðrastaðni í fíggjarlógini, men skal brúkast til at styrkja pedagogiska tilboðið í skúlanum.

Tú heldur hann ikki, at hald er í illgrunanum, sum læarafelagið luftar í greinini omanfyri.

Men kanst tú lova formanninum í lærarafelagnum, at samgongan ikki fer at brúka hetta høvi til at lække játtanina til skúlaverkið fyri at bøta um hallið á fíggjarlógini.

- Eg kann lova tað, so langt, sum eg kann ávirka, men at geva nakað lyfti fyri alla samgonguna, kann eg ikki, váttar Jóannes Eidesgaard.